

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 09 - 2011

# Veðurtænastan skal hjálpa í sambandi við oljudálking

Eftir áheitan frá grønlendsku myndugleikunum og oljufeløgunum, sum hava leitiloyvi í grønlendskum øki, hevur danska veðurtænastan ment eina eftirlitsskipan, sum skal brúkast, um eitt dálkingaróhapp hendir á sjónum Í sambandi við uppgávuna hevur DMI gjørt eitt modell, sum vísir, hvussu skjótt og hvønn veg oljan breiðir seg undir teimum givnu umstøðunum. Úrslitið skal so hjálpa myndugleikunum og feløgunum at steðga dálkingini, sigur Erik Busch hjá DMI við heimasíðuna hjá stovninum. Skipanin hjá DMI fer at virka so skjótt, at stovnurin verður førur fyri at koma við teirri fyrstu forsøgnini longu eitt korter eftir, at hann hevur fingið boð um eitt útlát. Síðani fáa myndugleikarnir og oljufeløgini forsagnir, sum siga, hvønn veg oljan fer, hvussu hon fer at breiða seg, og hvussu skjótt hon fordampar. Center for Ocean og Is, sum er ein deild hjá DMI, og sum hevur gjørt tað nýggja tilbúgvingarmodellið, kann eisini finna syndaran, um tað skuldi hent, at eitt skip koyrir spillolju í havið, skrivar heimasíðan hjá donsku veðurtænastuni.